VIÐMERKINGAR

# Hava føroyingar nakrantíð havt tað betur enn nú?

**Róaldur Jákupsson**

Tá vit fara á val tann 20. januar 2004 eiga vit at hugsa um hendan spurningin, og ikki um hvønn flokk pápi ella abbi okkara atkvøddi fyri ígjøgnum eitt heilt lív, ella um grannin ella vinurin, sum er so blíður og hjálpsamur er stillari fyri ein ella annan tilvildarligan flokk. Ein atkvøða má ikki spillast burtur uppá sovorið barnsligt óseriøst fjas. Vit skulu læra at hugsa og virka sjálvstøðug. Fyri at virka sum eitt sjálvstøðugt individ, er tað alneyðugt at man, tá man er vorðin vaksin, tekur í seg sjálvan, sigur farvæl vid mammu og babba, og flytir heimanífrá (í øllum førum í sinninum), fyri at taka ábyrgd av sær sjálvum og sínum egna lívið. Tá man hevur tikið hetta stigið, følir mann seg sum ein heilan og sterkan persón. Man finnir so møguliga útav at alt ikki er so ljósareytt, og til tíðir er tað ein kampur bara at halda seg omaná. Hendan avbjóðing hoyrir til eitthvørt lív, og ger lívið spennandi og innihaldsríkt, og individið sterkari og sjálvbjargið. Mær tykir synd í teimum, sum ongantíð koma so langt sum at taka hetta stigið, tí tey fara altíð at mangla nakað sera umráðandi í bagaguni. Um man ikki hevur tikið hetta stigið tá man er ungur í sinninum, og fullur av vónum um framtíðina, kann tað einaferð gerðast ov seint til at man nakrantí tekur seg saman. Tað ringasta av øllum er at man tá als ikki fer at leingjast eftir tí, tí man veit ikki hvat tað er og at tað manglar, man er vorðin vanur vid at onnur taka ábyrgd av eins egna lívið. Man er tá veruliga reduseraður til ein træl uttan herðar og rødd. Um man ongantí er vorðin vaksin, og komin so langt sum at taka ábyrgd av sær sjálvum, kann tað endað vid at man gongur runt við "tunnel vision", man sær ikki hvat hendir rundan um ein. Í ringasta føri kann hetta munna út í at man t.d. veruliga trýr uppá at tað er í ordan at nassa frá mammu og babba alt lívið, ella at tað er ok at snýta, stjala og lúgva og royna at plaserað skyldina aðrastaðni, ella at heidnir "kynsvillingar" ganga leysir runt í Føroyum, ella at heilavask er gott fyri sálina, ella at politiskar lappaloysnir er sakin og stabil politisk forhold uttan uppíblanding, er av tí ringa, ella at klassiskur høgra- og vinstrapolitikkur heldur skal avloysast vid klandur og grenj og sakleyst dupultmoralskt skeldarí, ella at korruptión kann akspeterast tá tað stuðlar eini góðari sak, ella at føroyingar hava tvey politiskt óheft bløð í Føroyum, ella at føroyingar høvdu tað nógv betri fyri 10, ella 100 árum síðani, ella at tað ongantí kann loysa seg at arbeiða hart, ella at tad er gott at onnur taka avgerðir fyri ein sjálvan… Tey, sum eru sterk, og ikki eru heilavaskaði og innetin korrupt, og harvið kunnu hugsa sjálvi, áttu at sett sær ein sentralan spurning: Hava føroyingar nakrantíð havt tað betri enn nú? Eg eri vísur í at hesin einfaldi spurningur kann hjálpa okkum tann 20. januar tá krossurin skal setast. At enda kann man seta spurningin: Kundi tað verið betri í Føroyum? Sjálvandi kundi tað verið betri, men vit eru jú bert komin í helvt enn…!!

Góða eydnu tann 20. januar 2004

# Víst skulu vit byggja land

## men ikki við at selja sál okkara til lægstbjóðandi

**Leivur Persson**

Nýggjasta veljarakanningin, sum bleiv almannakunngjørd mánadagin í málgagni Javnaðarflokksins Sosialinum, gjørdist ein ræðusøga av teimum heilt stóru fyri tjóðveldis- og fullveldisfólk í øllum Føroyum. Sum kunnugt, var tað hjá Tjóðveldisflokkinum, at afturgongdin var hin mest merkisverda og leggjast má tíverri aftrat, at flokkurin hevur tað heldur keðiligu siðvenju at fáa færri atkvøður á valið, enn honum er spátt.

Eftir hesi kanning at døma, so eru tað fólk í stórum talið, ið rýma frá flokkinum. Summi av hesum eru enntá at síggja á listum hjá øðrum flokkum og í miðlunum, har tey eftir øllum at døma ikki hava annað, enn markleysa háðan og spottan at bera fyrrverandi partamonnum og kvinnum sínum. Millum annað verður flokkurin lagdur undir, at hava svikið sínar veljarar, síni vallyftir og síni aðalmál.

Eisini verður flokkurin, og serliga formaður flokssins, Høgni Hoydal, lagdur undir at hava forkomið fullveldisgongdini og harvið fullveldinum, við at nýta eitt gamalt persónsmál hjá løgmanni sum umbering fyri at slíta samgonguna.

Nú eri eg somikið ungur, at eg hvørki kann loyva mær at rópa meg sjálvan klókan ella vísan Men tó má eg viðganga, at fatan mín av tí, sum er fari fram á politiska leikpallinum seinastu tíðina, brýtur somikið frá tí, sum summir av fremstu og royndastu politikarum okkara, (menn sum eru tvær ella trýggjar ferðir so gamlir sum eg) hava ført fram, at eg føli meg noyddan at siga mína hugsan um tað sum farið er fram

- Hetta mál byrjar ikki á einum frostvirki á Norðdepli fyri 20-25 árum síðani, men við einum almennum lesarabrævi frá Torbjørn Jacobsen á sumri 2002. Í hesum brævi teskar Torbjørn fram eina ákæru um óreglusemi í fortíð løgmans

- Ákæran er sum ein lítil neisti, ið festir í ein stóran eld. Boðað verður frá, at hvørki løgmaður ella flokkur hansara kunnu liva við, at sovorðnar álvarsligar ákærur kasta ein myrkan skugga yvir Løgmanssessin og løgman sjálvan. Annfinn krevur tí, sum samgonguleiðari og Føroya Løgmaður, at Tjóðveldisflokkurin blandar seg í persónsmálið hjá Torbirni, fyri at fáa hann at taka ákæru sína aftur. Tjóðveldisflokkurin og Torbjørn sýta fyri at ganga hesum á møti. Samgongan byrjar at rilla og tíðindi ganga um, at Fólkaflokkurin er farin at fríggja við Sambandsflokkinum. Tjóð-veldisflokkurin og Torbjørn sjálvur, sum tá ikki hevur prógv fyri ákærunum, gera av, at samgongan ikki má fara fyri bakka vegna slatur. Ein ovurfegin løgmaður kann tí á sjálvari tjóðarhátíð okkara, av landsins hægsta røðarapalli beint áðrenn hann skal til at seta eitt av heimsins elstur tjóðartingum, boða frá, at hann hevur eitt skriv frá Torbirni Jacobsen, sum hann ætlar at lesa upp. Í skrivinum tekur TJ allar ákærur sínar aftur, løgmaður boðar frá at málið er enda og man hoyrir ikki meira til tað á hesum sinni.

- Men…Í jólablaðnum hjá bókasølunum fyri 2003 stendur at lesa um eina heldur forvitnisliga bók, sum nevnist 'Skjót journalistin', ið lovar at koma við prógvum um óreglusemi løgmans.
  Ikki er meir enn hálvskrivað orð, so hevur hendan bókin, enntá áðrenn hon er útkomin, fest í ein nýggjan eld. Fólkaflokkurin ákærir Tjóðveldisflokkin fyri at standa aftanfyri hesa bók, men enn veit ongin hvat tað er, sum stendur í henni.
  Bókin kemur út og eldurin bara veksur, tað vísir seg at løgmaður hevur gjørt óregluligar flytingar fyri næstan eina millión. Men nú boðar løgmaður frá, at hetta onki hevur at siga, tí málið er somikið gamalt, sjálvt um hann sjálvur á sumri 2002 metti, at bert ákæran um óreglusemi var somikið álvarsom, at løgmaður ikki kundi liva í skugganum av henni. Fólkaflokkurin krevur nú eina reaktión frá Tjóðveldisflokkinum, men heldur nú fulveldisgongdini, sum gísla í hesum máli.
  Tjóðveldisflokkurin velur at seta tríggjar treytir fyri at samstarvið kanna halda fram, men tó nýtist bara ein av teimum at verða eftirlíka. Treytirnar eru: 1 Løgmaður kann biða um umbering fyri at hava minsnýtt løgmanssessin til at køva ákærurnar í 2002, 2 Løgmaður skal á ein annan hátt reinsa seg fyri teimum ákærum, sum eru reistar mótvegis honum, 3 Samgongan skal endurskipast.
  Fólkaflokkurin boðar frá, at hann ikki kann ganga treytunum á møti. Tjóðveldisflokkurin boðar frá, at hann ikki longur hevur álit á løgmanni.

- Landið situr sum á nálum um 10 tíðina 5 des. 2003, tá Løgmaður á tingi tekur orðið og boðar frá; at hevur avgjørt at koyra landstýrisfólk Tjóðveldisflokksins úr landsstýrinum, siga seg frá sum løgmann og skriva út nýval, meir enn tvey ár fyri tíðina.

Við hesum í huganum, hvør var tað so sum sleit samgonguna? Var tað Fólkaflokkurin, sum enn einaferð royndi at nýta Tjóðveldisflokkin til at køva alt tos um fortíð løgmans (sum nú enntá kundi skjalprógvast), og gjørdi hetta við at nýta aðalmál floksins sum gísla. Ella var tað Tjóðveldisflokkurin, sum ikki longur kundi góðtaka hesa misnýtslu og vanvirðing av landsins hægsta sessi.

Um man nú kundi husga sær, at Tjóðveldið valdi, ikki at gera nakað við málið, hvat hendi so? Jú so hevði anstøðan lagt fram missálit móti løgmanni og líkamikið um hetta uppskot hevði blivi samtykt ella ikki, so hevði tað verið Tjóðveldisflokkurin, sum stóð eftir við svartaperi.

Hevði hann góðtikið sum siðvenju, at løgmanssessurin bleiv misnýttur fyri at káva út yvir ivasomu fortíðina hjá løgmanni, hevði hetta syndra flokkin í fleiri pettir.

Ongin ivi skal verða um, at tjóðveldisflokkurin hevur valt at ganga tann smala vegin í hesum máli, vegin sum fáir aðrir flokkar høvdu torað at gingið. Flokkurin hevur tikið tað støðu, at man ikki kann byggja eitt land ella fullveldi omaná eina grund av embætismisnýtslu og óreglusemi, heldur enn man kann byggja eini hús oman á kyksand. Men, at ein tjóð má og skal grundast á tað meginreglu, at øll eru líka fyri lógini og at landsins leiðsla má ganga fremst sum eitt fordømi og ein stoltleiki fyri fólki, heldur enn at verða ein skomm.

Men av eini ella aðrari orsøk eru fólk, ið rýma frá flokkinum. Hví, hvat vilja hesi fólk, hví venda tey flokkinum bakið tá ið honum tørvar tey allar mest, tá alt stendur til at fara fyri bakka. Er tað veruliga so, at hesi fólk bara vilja verða við í tí partinum, sum hevur ráð til tær dýrastu vallýsingarnar og tí parti, sum sær út til at fara at vinna.

Vónandi er tað ikki so, vónandi fara fólk at vakna og vónandi fara fólk at síggja, hvat tað er, sum stendur til at fall, við hetta lagnuval.

p.s. Havi lisið greinina hjá Jón Ellendersen um Páll á Reynatúgvu. Nógv orð sum byrja við f renna mær í hug, men fakta er ikki eitt av teimum.

# Sambandslummaroknarin og søgan

Um sambandslummaroknarin hevur verið frammi nú
so hevur hann verið frammi áður

Einaferð skuldi suðringar fáa Smiril
Men tá segði sambandslummaroknarin nei

Einaferð skuldi útvarp koma
Men tað helt sambandslummaroknarin ei

Einaferð skuldi atlandsflog stovnast
Men sambandslummaroknarin meinti ei
Kanska tey flugva við Maersk bæði
Lisbeth og lummaroknarin tvey

Ei finnur tú framburð í reglunum her
Men áræði at sita gumpinum á
Farvæl fullveldi fram á skýggjan tónar

Góðandag afturhald, grønar keks og elli

Nú veljarin fer at stuðla teimum báðum í
At góðu Føroyar afturat ríkisboppuni skulu leggjast
Súgva seg gott feita og óhjálpin
Har er tryggleikin, líkasælan og svøvnurin honum á baki

**Jón Guttesen, Tvøroyri**



VIÐMERKINGAR

# Eitt húsvilt C

**Margreth Dalsenni**

Tankastreiggj úr Klaksvík.

Eg havi nú í eina tíð hugsað um, hví vit ikki kunnu brúka bókstavin C í føroyska málinum. Hann er jú allastaðir allíkavæl.

Tá eg hjálpi børnunum at rokna, so rokna vit stykki A, stykki B og píkarill eisini stykki C í føroyskari roknibók.

Eru ov nógvir næmingar til klassa A og klassa B í einum árgangi, so fara hesir í klassa C. Í einum føroyskum skúla.

Lesa vit í føroyskari heimsatlas, síggja vit, at Kanada misti sítt C, meðan staturin British Columbia í Kanada varðveitti sítt C. Sama gjørdi býurin Calgary.

Sama skili er í USA, har misti Kalifornia sítt C, meðan Colorado slapp undan.

Í statinum Washington er ein á, ið eitur Kolumbia áin við K, meðan aðrastaðir í USA eitur Colorado River við C. Fyrra áin misti bæði sítt C og River.

Og mín sann, um ikki ein býur í South Carolina við C eisini eitur Columbia. Hann varðveitti sítt C. Staturin Kolumbia í Suður Amerika mátti eisini svíða.

Hví skuldi Meksiko straffast so hart, tá New Mexico beint norðanfyri slapp at eiga bæði sítt X og C?

Tað eru óteljandi dømi um, hvussu mismunur verður gjørdur. Eg skal ikki troytta tykkum, men bert nevna nøkur fá:

| | |
|---|---|
| Cape Town | Kamerun |
| Cannes | Kambodja |
| Costa del Sol | |
| | Kili (Chile – neyðardýrið) |
| Colorado | Kuba |

Hví skulu allar Caféir og øll Caféteria í Føroyum hava loyvi at brúka C, og hví skulu bilarnir hjá Com Data hava nummarplátur, ið vísa CD…..tá abbabørnini hjá Niclan, Christian, Carl og Victor ikki kunnu eita eitt navn við C, tá tey hvønn dag skulu rokna stykki C í føroysku roknibókini og ganga í klassa C í føroyska skúlanum og eta C vitaminir hvønn dag?

Eg undrist!

Tilseinast kundi eg kanska nevnt valið, ið stendur fyri framman. Har stríðast allir flokkar av øllum alvi at fáa sum flest atkvøður.

Eisini listi C.

Gott nýttár øll somul og gott val.

# Røktarheim – Nei takk !

**Kári Árting**
*Nevndarlimur í Alzheimerfelagnum*



Í gullbrúðarøkinum við Líðirnar í Havn vilja tey ikki hava nakað røktarheim. Tað má vera niðurstøðan, eftir at roynt verður at støðga hesari bygging fyri triðju ferð.

Tað kann vera, at býráðið var óskettið áðrenn byggingin varð sett í verk við sínari manglandi kunning til grannarnar, men har hekk immervekk ein stór talva við ætlnunum í mánaðir, áðrenn byggingin varð byrjað. Onkur kom so sum ketta upp úr høvdatrog, tá ið byggingin var byrjað. Og tað rættvísisger ikki herferðina ímóti røktarheiminum nú.

Sjálvandi virði eg rættin hjá grannunum at mótmæla, men haldi sjálvur, at grundirnar fyri mótmælunum halda ikki. Eg hevði vónað, at grannanir høvdu tosað við Býráðið, heldur enn at berjast ímóti ætlanini.

Ført hevur verið fram, at økið er einaferð sett av til spælipláss. Eg ivist ikki í, at Býráðið hevur annað øki í granna-lagnum at vísa á, um tað er hetta sum manglar.

Økið er upprunaliga sett av til fríøki. Men enn eru fleiri traðir í grannalagnum, sum ikki er bygt á, sum bæði eru størri og fríðari enn hetta grundstykkið.

Onkur kemur ivaleyst at missa eitt vet av útsýni. Tað er sjálvandi harmiligt, men hetta heimið verður ikki hægri enn hini húsini í grannalagnum, tvørturímóti.

Tað kann so eisini vera, at hesi fólkini eru óynskt í grannalagnum, men so hava vit øll ein nógv størri trupulleika.

Um byggingin var farin fram sum upprunaliga ætlað, hevði heimið verið liðugt í dag. Tað kann so væl vera, at hetta hevði gjørt, at húsaprísurin fór upp í grannalagnum. Men hetta hevði ikki loyst allan røktar- og ellisheimstrupulleikan, tí tað standa eini 50 dement fólk á bráðfangislista. 160 onnur vera rakt av Demensjúkuni í Føroyum um árið.

Vónandi fara fólk í øðrum økjum ikki at føra slíkan strutsapolitikk.

# Skal respiratorurin sløkkjast?

**Petur H. Jacobsen**
*06.01.04*

Líka síðani rækjuflotin fór í respirator, hevur verið nógv tosað um, hvat skal henda.

Ymiskar loysnir hava verið frammi fyri at bjarga rækjuflotanum, men tað hevur verið í øllum royndum, sum at kasta perlur fyri svín. Okkara stýrandi land hevur í alla hesa tíð, teir hava sitið við valdið, vent okkum bakið. Tað er ikki rækjuflotin, sum hevur ligið brakk. NEI! tað hevur verið okkara stýrandi vald, sum hevur ligið í einum andaleypi og fjalt seg frá veruleikanum.

Nakrir skipaeigarir hava longu sløkt, og aðrir eru væl á veg. Eitt umboð fyri Tjóðveldisflokkin hevur úttalað, at vit skulu taka bíligari skip inn í flotan, tí Hvilvtenni var ov dýrur. Hvar eru vit? Skulu vit fara aftur í øskudungan fyri at fáa hjálp. Hvilvtenni, sum fekk kvalaratakið frá landi okkara, hava íslendingar í dag útnevnt sum sítt flaggskip. Hvat við FAS skipanini? Verður bakið eisini vent ímóti hesi ætlan, Sambandsflokkurin hevur lagt fram?

Tað er alt í lagi, at vit føroyingar eru ósamdir um, hvørt skip skulu fáa stuðul ella ikki, men at ein FAS skipan verður løgd undir at verða ein stuðul frá landinum er ikki satt.

Rækjuflotin hevur í dag eina inntøku, sum 100% er fíggjað av rækjuflotanum sjálvum. Landið letur ikki eina krónu ella eitt kilo fyri rættindi at veiða rækjur. Hettar fíggjar rækjuflotin. Tað einasta vit biðja um er, at landið fær eitt sindur minni inn í skatti enn áður við eini FAS-skipan. Nei, landið vil heldur hava einki enn eitt sindur minni inn í kassan. Landið er nokk bangið fyri, at rækjureiðaríini fáa ov nógvan pening í sín egna kassa, men so er ikki. Spurningurin er her hjá okkum um at yvirliva og royna at koma upp ímóti einum nulli, sum ein FAS-skipan í eitt tíðarskeið kann bjarga okkum við.

Rækjuflotin hevur ikki nógva orku eftir. Funktiónirnar eru farnar at rilla. Spurningurin er, nær sløkt verður?

Her er talan um politikk, ið drepur okkara FØROYA LAND við sínum snýkjandi kvalaratakið.

# Sjálvstøðugur føroyskur búskapur: Sæð uttanífrá

**Dmytro Jakovenko**
*Bodø (Noregi)*



Á Løgtingsvalinum tann 20. januar skulu føroyingar avgera framtíð landsins fyri tey komandi fýra árini. Um so er, at fráfarna samgongan megnar at varðveita meirilutan í tingmannatali og fer at samstarva aftur, eru góð útlit fyri, at politiska gongdin við yvirtøkum og meira sjálvræði, ið byrjaði fyri nøkrum árum síðani, allar møguleikar hevur fyri at halda fram. Sum úrslit av hesum, kunnu Føroyar um eitt áramál loysa seg úr danska ríkisfelagskapinum, og eitt sjálvstøðugt føroyskt ríki verður sett á stovn. Men hvørjar fyrimunir hevur búskapur í einum møguligum sjálvstøðugum Føroyum, sammett við støðuna, sum hon er?

Í dag ber tað ikki til at ímynda sær eitt vælferðarsamfelag, ið ongan lut tekur í búskaparligu globaliseringini í heiminum og økjandi samstarvi landanna millum – á jøvnum føti, uttan mun til, hvussu stórt ella lítið landið er – í stødd ella í fólkatali. Orsakað av hesum, hava allir sokallaðir "pinkustatir" rætt til at vera uppi í øllum millumtjóða samráðingum púra sjálvstøðugt, og sleppa tískil undan politiskari ella aðrari ávirkan ella trýsti frá einum "móðurstati". Varðveita Føroyar sína kós ímóti fullum sjálvstýri, fáa tær, sum ein nýggjur sjálvstøðugur pinkustatur, møguleikar fyri at gagnnýta hesar fyrimunir. Hetta fær eina jaliga ávirkan á búskapargongdina. Meira altjóðagerð av føroyskum uttanlandsbúskaparpolitikk i og føroyskum fyritøkum og skattalætti hjálpir føroyingum at loysa fleiri fíggjaligar trupulleikar, so sum lága støðið av kapitalakkumulering í landinum í dag.

Ein annar trupulleiki, sum føroyskar fyritøkur hava á altjóða marknaðinum, er manglandi upplýsing fyri møguligum útlendskum samstarvsfeløgum í føroyska vinnulívinum og Føroyum sum heild. Orsakað av ríkisrættarligu støðuni eru Føroyar als ikki kendar úti í heiminum, í mun til aðrar pinkutjóðir í Evropa (Ísland, Monako, Liktinstein, Andorra, San Marino). Hetta trotið á upplýsing ávirkar menning av føroyskari ferðavinnu, eins og marknaðarføring av føroyskum fyritøkum uttanlands. Tað er einki at ivast í, at møguligir útlendskir samstarvsfelagir eru meira áhugaðir í feløgum umboðandi ein sjálvstøðugan stat, heldur enn lítið sjónligan sjálvstýrandi part av einum øðrum ríki. Tað vísir seg eisini, at øll evropeisku fullveldisríkini við fólkatali minni enn 500.000 fólk (tey omanfyri nevndu umframt Luksemborg og Malta) umboða fyrimyndaliga virkandi vælferðarsamfeløg við nógvum møguleikum fyri sínar borgarar. Og hesar tjóðirnar, burtursæð frá Íslandi, hava onga fiskivinnu, sum bein at standa á. Bankavirksemi og ferðavinna eru í sínum fagrasta blóma í teimum londunum.

Sum útlendskur búskaparfrøðingur, ið gjølla hevur fylgt gongdini í Føroyum tey seinastu árini, kann undirritaði síggja nógvar fyrimunir við sjálvstøðugum føroyskum búskapi. Men sjálvberandi búskapur er treytaður av, at hóvlig fullveldisgongd við yvirtøkum heldur fram, við fullveldistøkuni innan eitt ávíst áramál.

** Dmytro Jakovenko er útbúgvin "Bachelor of Science in International Economic Relations" frá Lærda Háskúlanum í Kænugarði (Ukraina). Í løtuni er hann undir víðari útbúgving til "Master of Science in International Business Administration" á Lærda Háskúlanum í Bodø (Noregi)*